# Grøn vælferð, sosialisma



**Í aðru greinini í røðini um íslendskan samtíðarpolitikk hitta vit Katrín Jakobsdóttir, næstformann í Vinstra-grøna flokkinum. Upp á seg er hon nýggj í politikki og fremst uppstillað hjá flokkinum í Reykjavíkar norðara valdømi. Eru veljarakanningarnar eftirfarandi, fær Vinstri-grøni flokkurin 21,2 prosent av atkvøðunum. Sambært seinastu kanning, er rættiliga vist, at Katrín Jakobsdóttir verður vald. Altingsval er í Íslandi komandi leygardag**

POLITIKKUR



*Carl Jóhan Jensen*
*Reykjavík*

Vinstri-grøni flokkurin ella *Vinstrihreyfingin grænt framboð,* sum flokkurin eitur á íslendskum, er eitt av mongum úrslitum av skjótt aldarlongum rembingum á vinstraveinginum í íslendskum politikki. Borgarligi ella høgravongurin hevur, sum nevnt í greinini um Sjálfstæðisflokkinn, evnað at staðið saman um tann flokkin og hóast okkurt brotið av og á er klovnað frá, so hevur tað ikki ørkymlað eindina nevnivert.

Á vinstraveinginum hevur spjaðing hinvegin valdað tað mesta av tjúgundu øld. Flokkar og fylkingar, misvíðgongd avbrigdi av sosialismu, tóku seg upp og sigu niður aftur í gloymskuna í slíkum tali, at tú krevur at vera meira enn kønur í politisku søgu Íslands til at halda skil á teimum.

Í fýrsárunum og langt inn í hálvfemsárini vóru, umframt ymiskt ovurróttøkt smákras (trotskistar, maoistar o.s.frv) tríggir ymiskir flokkar vinstrumegin miðjuna í íslendskum politikki: *Alþýðuflokkur* (javnaðarflokkurin), *Alþýðubandalagið* (sosialistaflokkurin) og *Kvennalisti* (kvinnulistin). Allir hesir flokkar lógu í alsamt harðari stríði við seg sjálvar og hinar vinstriflokkarnar, sum sjálvandi styrkti miðjuna, *Framsóknarflokkinn*, og ikki minst høgraveingin *Sjálfstæðisflokkinn*.

Í 1998 tóku partar av *Alþýðubandalaginu*, *Kvennalisti* og *Alþýðuflokkurinn* seg saman um at stovna ein nýggjan sosialdemokratiskan flokk: *Samfylkinguna*. Fleiri tingfólk hjá *Alþýðubandalaginu* vóru tó illa foreint við hetta samstarvið og stovnaðu annan flokk *Vinstri-hreyfinguna grænt framboð.* Flokkurin stillaði fyrstu ferð upp til Altingsval í 1999.

Tær politisku áherðslurnar hjá flokkinum eru nøkulunda tær somu sum hjá øðrum norðurlendskum sosialistaflokkum, eitt *Sosialistisk venstreparti* í Noreg og *Sosialistisk Folkeparti* í Danmark, men flokkurin hevur eisini tikið upp fleiri av stevnumiðunum hjá teimum sokallaðu grønu flokkunum í Evropa, eitt nú *Die Grünen* í Týsklandi.

## Umhvørvi og stórídnaður

Blaðmaðurin hitti næstformannin í Vinstri-grøna flokkinum, Katrín Jakobsdóttir, á tingfloksskrivstovuni við Vonarstræti ein vátaslettingskaldan miðvikumorgun. Katrín er 30 ára gomul, hevur meistaraprógv í íslendskum. Hon hevur verið virkin í Vinstri-Grøna flokkinum síðani 2002 og er, sýnast flest at vera á einum máli um, millum áhugaverdastu nýkomingar í íslendskum politikki.

Blaðmaðurin legði fyri við at spyrja, hvørji mál flokkurin serliga leggur dent á í valstríðnum upp undir komandi Altingsval.

Katrín Jakobsdóttir: Umhvørvið, sjálvandi. Tískil vilja vit eisini hava ein steðg í stóríðnaðarútbyggingina í landinum, ið ikki altíð er líka væl umhugsað. Tíbetur er líkt til, at nettupp umhvørvið, náttúruvernd og stóríðnaður verða tey stóru málini í hesum valstríðnum. Fyri smáum trimum vikum síðani var t.d. fólkaatkvøða í Hafnafirði um eina ætlan at víðka aluminiumsverksmiðjuna har. Meiriluti var ímóti ætlanini. Hetta hevur rættiliga fingið spurningin um stóríðnaðin fram í ljósmálan. Ikki bara í Hafnarfirði, men eisini aðrastaðni um landið, eitt nú í Húsavík, verður dúgliga kjakast um aluminiumsverksmiðjur og stóríðnað. Og tað er einki at taka seg aftur í, at vit, Vinstri-grønu, hava fingið viðstreym og fleiri og fleiri halda við okkum um umhvørvið og náttúruvernd.

*Tú sigur at tit vilja steðga á við stóríðnaðarútbyggingini, men er slík útbygging ikki í roynd og veru til gagns fyri íslendska búskapin og íslendska samfelagið sum heild?*

- Í fyrsta lagið er eingin náttúruverndarskipan gjørd, eingin heildarætlan er heldur um, hvussu orkan skal nýtast, sum í umbúna er at framleiða. Tvørturímóti hevur lagið verið tað, at kemur onkur stórfyritøka og sigur, hygg, vit ætla at byggja eina verksmiðju, men okkum vantar orku, so flúgva myndugleikarnir upp í vong og leypa út í stórar verkætlanir. Eins og t.d. á Eysturlandinum, tá ið farið varð undir at gera Kárahnjúkabyrgingina. Tann ætlanin fekk sera vánalig ummæli frá serfrøðingum. Hetta var eitt dýrt og hartil ólagaligt tiltak, tí Kárahnjúkaverkætlanin var eitt stórt inntriv í eitt viðkvæmt umhvørvi. Kortini var farið gleiðbeint avstað. Uttan mál og mið. Vit halda hinvegin, at ein framtíðarætlan má vera tøk, áðrenn farið verður víðari. Vit siga sostatt ikki, at eingin aluminiumsverksmiðja skal byggjast aftur. Vit halda bert, at nú eiga vit at steðga á eitt sindur og gera okkum hugmyndir um, hvat vit vilja í frameftir, um vit eiga at halda fram at byggja aluminiumsverksmiðjur óendaliga ella um vit skulu hugsa um aðrar ídnaðarmøguleikar eisini. Fyri okkara viðkomandi leggja vit dent á, at hugsað eigur at vera betur um, hvat slag av orkuútbygging, ið farið verður undir. Kárahnjúkabyrgingin hevur sum sagt gjørt stórt rov í náttúruna og har er komin ein bládjúpur pollur innanfyri. Í staðin eiga loysnir at verða valdar, sum órógva náttúruna minst møguligt. Hinvegin er eisini ein búskaparlig vídd í hesum. Tann stóríðnaðaruppbygging, sum fram er farin tey seinastu árini, hevur havt ovvøkstur við sær í samfelagnum. Virðisminkingin (inflation) hevur verið stór, eini 7-8 prosent um árið. Somuleiðis er rentustigið høgt, fólk rinda millum 15 og 25 prosent í rentu av brúkslánum (t.d. sokallaðum yvirdráttarlánum, sum eru rættiliga vanlig í Íslandi). Og smáar fyritøkur t.d., tær fáa yvirhøvur bert stuttfreistað lán við høgari rentu. Tað er ikki óvanligt at slíkar fyritøkur mugu gjalda 15 prosent í rentu av lánum, við afturgjaldingartíð upp á seks ár. Tað sigur seg sjálvt, at fólk aftrað seg við at fara undir vinnurakstur upp á slík kor, við so høgum fíggingarkostnaði. Nú er tíð upp á at finna ráð til at tálma ovvøksrinum, miðvíst royna at steðga virðisminkingini *(inflation)* og lækka rentuna.

*Og tað gerst við at steðga stóríðnaðaruppbygingini?*

- Stóríðnaðarútbyggingin er, ið hvussu er, høvuðsatvoldin í, at búskapurin tembist út. Tað boðar heldur ikki frá góðum, at sam-